## DAGSINS MEINING

# Tjóðveldið í posa og sekk – bara ikki sín politikk

Tjóðveldisflokkurin hevur við 4 landsstýrismonnum fingið í posa og sekk – hóast noyddur til at leggja fullveldiskongin. Flokkurin má sanna, at politikkurin hann hevur staðið á odda fyri og sum er ein snarferð móti fullveldinum Føroyar hevur hvørki undirtøku millum veljararnar og tiansheldur millum hinar flokkarnar. Vit síggja tí í dag ein Tjóðveldisflokk, sum hevur fingið tikið politisku tenninar út men sum so løgið tað ljóðar kortini situr við maktini. Og hvussu kann ein flokkur, sum nærum sleppur sínum politiska samleika blíva sitandi við maktini! Og hvussu ber tað til, at tann flokkur, sum nú í fýra ár hevur roynt at sannføra veljararnar og hinar flokkarnar um tað skilagóða í at reka ein hóvligari sjálvstýrispolitikk verður vístur til eina oyðimarkaferð í enn fýra ár!

Samgonguskjalið, ið teir fýra flokkarnir hava góðtikið, kann í hvussu er C taka undir við og helst eisini B. So langt hava A og E førkað seg. Tað má kennast bæði láturligt og grátuligt fyri C, sum nú í fýra ár hevur staðið á barrikadunum og stríðst ímóti tí víðgongdu fullveldisbylgjuni, at síggja sín egna politikk festan á blað í einum samgonguskjali millum fýra heilt aðrar flokkar – og at verða útihýstan frá at vera við til at reka henda sama politikk. Onkur vil siga, at samgonguflokkarnir hava stolið politikkin frá C.

Ikki er lætt at vita, hvussu hvør hevur telvað handan leiktjøldini undir samráðingunum, men mangt bendir á, at EINASTA málið hjá E eftir valið hevur verið at halda C uttanfyri. At A eisini hevur havt hesa ætlan skulu vit ikki siga, men spurningurin er, um løgmaður, ið hevur lagt so stóran dent á at fáa C við, gjørdi sær nóg stóran ómak við hesum! Hugsaði hann meira um sín egna sess heldur enn um breiðu samgonguna? Hann var jú gissul hjá E, tí um hann misti stuðulin frá honum, misti hann eisini initiativið til sambandið.

E fær uttan iva sínar fýra landsstýrismenn. Tað hevur hann ætlað alla tíðina. Tí við hesum tali av málsøkjum fær flokkurin bygt upp eina bastión sum ongantíð fyrr. Flokkurin fær fleiri nýggj fólk á ting og fær harvið ment sítt bakland til eitt komandi val. Flokkurin fær gjørt sína ávirkan galdandi í nærum allari miðfyrisitingini og út í nærum hvønn krók av landinum. Eftir at hava tapt stríðið um her og nú fullveldið hevur flokkurin kortini telvað so væl, at hann situr við størsta partinum av maktini í Føroyum.

Nú kann verða spurt, í hvønn mun C hevur telvað seg í andstøðu. Hevði hann ikki møguleika at koma í eina samgongu við A og E! Góðtaka vit, at E ultimativt vildi ikki hava C við, og at løgmaður fyri einhvønn prís vildi halda fram í sínum sessi við stuðuli frá E, so er svarið einfalt, at har var einki at gera. Tað ber eisini til at útleggja talvið soleiðis, at C í sínum óvanliga solidariteti við B mistulkaði støðuna - áhaldandi útmeldingarnar frá C um at fáa B við tvingaðu løgmann til at taka Jenis inn og harvið gróv C sína egnu grøv. Eftirtíðin verður best at meta um hetta. Spurningurin er: hevði C verið við í samgonguni, um hann telvaði skilabetri! Fyri veljarar hjá C má henda støða verða ørkymlandi og særandi: at síggja eitt politiskt amputerað E sigursælt marsjera víðari við 4 – FÝRA – landsstýrismonnum – og við politikkinum hjá C í skjáttuni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Politikkur og útspilling - noyðast tey at ganga hond í hond?

**Jákup Sverri F. Kass**



Útspilling hoyrir, tíverri, til tann politiska gerandisdagin í Føroyum. Tað er ein veruleiki, sum flest øll, sum hava havt við politikk og vinnulív at gera, hava verið úti fyri. Tað tiltikna »Jantelov-syndromið«, sum danir so ofta nevna tað, hevur rakt føroyingar og Føroyar; tad er ongin ivi um tad.

Eg trúgvi, at flest øll fara uppí politikk, tí tey vilja gera nakad gott fyri land og fólk. Og vera tey vald, so er orsøkin helst hon, at veljarin vil hava viðkomandi at umboða seg og síni.

Men onki heiðursmerki uttan eina baksíðu. Baksíðan á politikkinum er ikki altíð so pen. Nógvar eru søgurnar, slaturin og øvundsjúkan. Onkuntíð passa søgurnar; men onkuntíð (ofta) passa søgurnar ikki. Tað, at mótarbeiða einum persóni, krevur nógva orku. Um hendan orkan hevði verið brúkt til at arbeiða saman um felagsloysnir, so ivist eg ikki í, at vit høvdu fingið eitt nógv betur úrslit. Men tað vísir seg, at fær man ikki bóltin, so fer man eftir manninum.

Hugsið tykkum eina vinnuliga fyritøku har øll mótarbeiða hvørjum øðrum – hvussu hevði framtíðin sæð út hjá henni?

Nú skal hetta lesarabrævið ikki vera ein roynd at vaska hendur, undirritaði man hava verið líka ringur til at brúka somu amboð sum restin.

Tað virkar, sum hava vit ilt við at unna hvørjum øðrum eitt sindur av viðgangi. Fær ein ov nógvan vind í seglini – so skal onkur nokk minna viðkomandi á, at vindurin nokk skal taka av – heldur fyrr enn seinni.

Men eg vildi ynskt, at tað ikki var soleiðis – eg vildi ynskt, at vit føroyingar lærdu at virða hvønn annan, eins og vit sjálvi ynskja at vera vird. Ein verður ikki størri av, at annar verður minni.

Hesi orðini eru bert ætlaði sum eitt hjartasuff - eitt hjartasuff við vón um at vit føroyingar einaferð læra at taka okkum væl av hvørjum øðrum, og ikki altíð royna at leggja eftir tí veika ella minni positiva hjá mótpartinum.

Vónandi hava vit anno 2002 valt eitt Løgting, har tað verður farið eftir bóltinum – heldur enn manninum. Tað vildi í síðsta enda gagnað bæði fólki og landi.

# Fingu 11 fyri uppgávu um Restorffs

TÍÐINDASKRIV

Tær fýra ungu kvinnurnasr Ada Joensen, Sigrid Midjord, Vivian Mikkelsen og Fía Selma Nielsen úr flokki F1 á Handilsskúlanum vóru mánadagin 27 mai til próvtøku. Tær høvdu valt at viðgera RESTORFFS BRYGGJARÍ, tí tær hildu at nýggja eigaraskifti hevði gjørt hetta gamla felag meira dynamiskt og sjónligt við teirra øðrvísi og provokerandi lýsingum og við harvið vaksandi eftirspurningi.

Bólkurin viðgjørdi søguna hjá felagnum, marknaðarføring, framleiðsluna, fíggjarstøðana, fyrisiting og til seinast ein SWOT kanning.

Lærari og próvdómari hildu uppgávuna verða so mikið væl fráginga og ivaðust ikki í at geva bólkinum eitt 11 tal.




*Tær fýra ungu kvinnurnasr Ada Joensen, Sigrid Midjord, Vivian Mikkelsen og Fía Selma Nielsen úr flokki F1 á Handilsskúlanum*

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ruðuleikin um Suðuroyarfjørð

**Jaspur Vang, Tvøroyri**



Strandsfaraskip Landsins og/ella landsstýrismaðurin í samferðslumálum ganga ímóti løgtingsins vilja, eins og farið verður sera lætt um lógina um fólka- og farmaflutning, nú ruðuleiki aftur valdar á farleiðini um Suðuroyarfjørð. Hvørt talan er um ábyrgdarloysi, ódugnaskap ella tilætlaðan landspolitik, er ilt at meta um.

Týdningurin av einum nøktandi fólka- og farmaflutningi.

Tá tað eftir drúgt stríð millum kommunalu myndugleikarnar í Suðuroynni og landsmyndugleikarnar eydnaðist at fáa "Norrønu" at røkja farleiðina um Suðuroyarfjørð í apríl-mei 1998, meðan "Smyril" var til eftirlit, ferðaðust uml. 3.000 fleiri ferðafólk um Suðuroyarfjørð, enn somu tíð árið fyri.

Til sammetingar kann nevnast, at tá "Claymore" í mei-juni 2000 røkti somu farleið, meðan "Smyril" var til eftirlit, fall talið á ferðafólkum á farleiðini 25 % og talið á bilum 39 % í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

Harafturat skulu leggjast tey skaðaárin, vánaliga sambandið hevur á vinnulívið og ferðavinnuna í oynni og skaðin á framtíðar vinnumøguleikarnar væntandi álitið á samferðslukervið førur við sær. Ein av grundgevingunum hjá oljufeløgunum fyri ikki at leggja oljuútgerðarhavnina í Suðuroynni segðist jú eisini vera vánaliga sambandið um Suðuroyarfjørð.

Almenni stovnurin og landsstýrismaðurin, ið hava ábyrgdina av farleiðini, kenna væl týdningin av einum nøktandi sambandi um Suðuroyarfjørð.

Leiðslan á Strandfaraskipum varð jú í fjølmiðlunum tann 28.05.02 endurgivin fyri at staðfesta, at "Scania" nøktar tørvin á farleiðini, eisini í vikuskiftunum, tí tørvurin jú lagar seg eftir vánaliga sambandinum. Ikki eiti á visiónir.

### Lógargrundarlagið.

Eftir løgtingslóg nr. 82 av 15. mei 2001 um fólka- og farmaflutning, áliggur tað Strandfaraskipum Landsins at skipa fyri nøktandi fólka- og farmaflutningi millum oyggjarnar.

### Løgtingsins vilji

Tá núverandi "Smyril" varð keyptur miðskeiðis í 1970-unum, varð tað løgtingsins avgerð, at hettar skip var ein nøktandi loysn á leiðini um Suðuroyarfjørð.

Tá løgtingið í evstu løtu, stutt fyri tað nú áðrenn løgtingsvalið nærmast fór í upploysing, tók avgerð um at byggja nýtt skip til Suðuroyarleiðina, var tað væl eisini løgtingsins avgerð, at ein nøktandi og tíðarhóskandi loysn á leiðini um Suðuroyarfjørð, er eitt skip á sama støði sum skipið, ið sáttmáli er undirskrivaður um at byggja.

### Samgonguskjalið hjá sitandi samgongu

Í nevnda samgonguskjalið, pkt. 12, verður staðfest, at Landsstýrið hevur skyldu til at tryggja hóskandi ferða- og flutningssamband millum tey ymsu plássini í Føroyum, og at samgongan ásannar, at ferða- og flutningssambandið hevur alstóran týdning fyri vinnumøguleikar og trivna í landinum.

Hvat Suðuroynni viðvíkur bindur skjalið flokkarnar til at dagføra samferðsluna við Suðuroynna beinan vegin, og at kanna møguleikarnar fyri loftvegis sambandið við flogfari.

Ja, so føgur vóru orðini fyri 4 árum síðani.

### "Dúgvan"

Tað er ein sannroynd, at hettar skip als ikki hevur neyðuga kapasitetin og ikki er nóg sjógott til farleiðina, og tí ikki er ein nøktandi loysn.

Harafturat hevur landspolitiski myndugleikin og Strandsfaraskip Landsins í mong ár verið vitandi um - og góðtikið forboðið "Dúgvan" hevur móti at leggja at við samferðsluhavnina í Suðuroynni.

At tað eydnaðist Strandfaraskipum Landsins og Løgmannskrivstovuni at skúgva kommunala myndugleikan til viks, hevur ført til illgitingar um, at ætlanin alla tíðina hevur verið at seta "Dúgvuna" inn fyri "Smyril". Um hesar illgitingar vóru rættar, hevði verið talan um snildisliga, tilætlaða undirgraving av løgtingsins vilja og lóggávuni á økinum.

Tí er tað lítið hugsandi, at Strandfaraskip Landsins frá byrjan hevur havt ætlanir um at "Dúgvan" skuldi avloysa "Smyril".

Nevndu illgitingar bera tó prógv um væntandi álitið á almenna stovnin og landspolitiska viljan og hugburðin.

### "Scania"

Hevur Strandfaraskip Landsins frá byrjan havt ætlanir um at lata "Scaniu" avloysa "Smyril", meðan hesin var til eftirlit, er talan um ábyrgdarleysan ódugnaskap út um alt mark. Skipið hevur ikki festi til at hefta góðs, trailarar og onnur akfør í, og kann tí als ikki nýtast til farma- flutning um Suðuroyarfjørð, so sum tað nú eisini hevur víst seg.

Í tí, sum av sjómonnum verður mett sum "hampuligt sjóvegur", má siglingin um Suðuroyarfjørð avlýsast vegna væntandi sjódygd.

Stólar og borð eru ikki fest, og aka ferðafólkini tí aftur og fram eftir dúrkinum, bert skipið rullar eitt sindur.

Hvussu tað er eydnast almenna stovninum at finna eina so vánaliga loysn, uttan at boða landsstýris- manninum frá trupulleikanum, man vera mongum ein gáta.

### Strandfaraskip Landsins

Stovnurin vísur á, at neyðugur peningur ikki var játtaður so mikið rættstundis, at møguleiki var fyri at leiga eitt hóskandi skip til farleiðina um Suðuroyarfjørð.

Í hvønn mun stovnurin gjørdi sína skyldu, og meðan tíð var boðaði landsstýrismanninum, ið hevur ábyrgd av stovninum, frá hesum ítøkiliga trupulleika, sum hevur gjørt seg galdandi fleiri fylgjandi ár, sigur søgan einki um.

### Landsstýrismaðurin.

Hesin vísir á, at Strandfaraskip Landsins ikki hevur skylt galdandi lóggávu/skipan rætt, og tí rættstundis kundi havt leigað hóskandi skip til Suðuroyarleiðina.

Samstundis rættvísger landsstýrismaðurin kleyvarskapin og skjýtur øðrum í skógvarnar, at teir ikki tóku undir við uppskotinum um keyp av avloysaraskipi.

Vónandi nýta landsstýrismaðurin og leiðslan á Strandfaraskipum Landsins ikki farleiðina um Suðuroyarfjørð sum jarnbrot í royndunum at fáa løgtingið til at keypa avloysaraskip.

### Niðurstøða

Skipini "Dúgvan" og "Scania" lúka als ikki tær treytir og tey skip, ið Føroya Løgting ávikavist miðskeiðis í 1970-unum og so aftur fyrr í ár tóku avgerð um skulu vera nøktandi skip til fólka- og farmaflutning á umrøddu farleið. Tískil hevur Strandfaraskip Landsins/Landsstýrismaðurin í samferðslumálum ikki virkað í tráð við løgtingslógina um fólka- og farmaflutning, samgonguskjalið og als ikki í tráð við løgtingsins vilja. Harafturímóti hevur Strandsfaraskip Landsins sett skip inn á farleiðini, ið eru minni hóskandi, enn skipið (núverandi "Smyril"), sum Føroya Løgting miðskeiðis í 1970-unum metti vera eina nøktandi loysn.

Higartil hevur málið ikki fingið avleiðingar, eingin hevur átikið sær ábyrgd, eins og einki er gjørt fyri at byrgja fyri, at slíkt endurtekur seg.

Tað er ikki rætt, at tað tilkemur einum almennum stovni og einum tilvildarligum landsstýrismanni, móti løgtingsins vilja, á hvørjum ári í longri tíðarskeið at seta farleiðina til Suðuroyar 30 ár aftur í tíðini.

### Framtíðin.

Ruðuleikin á Suðuroyarleiðini er eitt ítøkiligt dømi frá gerandisdegnum um, hvussu ein landspolitiskur myndugleiki og ein almennur stovnur, undir einari landspolitiskari leiðslu, sum hevur sett sær sum aðalmál at fáa fult vald (fullveldi) á føroyska samfelagnum, virka í veruleikanum.

Í hesum máli er ongin danskur myndugleiki at skúgva ábyrgdina yvir á, eingin viðurkennur sær ábyrgd og tekur í egnan barm. Spurningurin er tí, í hvussu stóran mun okkara almennu stovnar, landsumsitingin og politiska skipanin eru stórt meira búgvin enn í 1980-unum.

Um so var, at tílíkur ábyrgdarleysur ódugnaskapur, sum er komin til sjóndar í hesum málið, var farin fram innan eitt nú løgreglu – og rættarskipanina, hernaðarliga verju, ella í uttanríkisviður- skiftum, hevði tað havt eins álvarsligar samfelagsligar fylgjur við sær, og hettar mál hevur havt fyri Suðuroynna.

Tá hugsað verður um, at fullveldisflokkarnir fóru til val við herrópum um "at nú skuldu føroyingar taka ábyrgd og við áræði byggja land", "treysti, trygd og trivnaður" v.m., mugu vit ásanna, at fyri flestu suðuroyingum tykist landspolitisk ábyrgd eins veruleikafjar og landspolitiski viljin til trygd og trivnað um alt landið.

Fyribyrgingarráðið - spurningar og svar um tubbak - "Hví tað loysir seg at gevast.

# Eg havi roykt í 20 ár. Er ikki longu ov seint?

Nei, tey góðu tíðindini eru, at tað er ongantíð ov seint at gevast. Tú skerjir vandan fyri sjúkum, íð standast av tubbaki næstan alt fyri eitt, tú heldur uppat at roykja. Sjálvandi er betri, skjótari tú gevst.

*Eftir: 20 minuttum*
tekur nøgdin av tubbakseitri at minka, og blóðtrýstið, hjarta-slátturin og pulsurin verða aftur, sum tey eiga at vera.

Hetta ger, at vandin fyri hjartaslagi minkar.

*12 tímum:*
nøgdin av kolsúrevni í blóðinum minkar, og nøgdin av súrevni økist.

*einum mánaði:*
fert tú at duga betur at meta um, hvussu okkurt angar og smakkar. Lungnapípurnar verða smidligari, so tað verður lættari hjá tær at draga andan djúpt. Kroppurin hevur stríðst við at endurbøta nervalagið. Tú fert kanska at varnast, at tú orkar meira.

*tveimum til trimum mánaðum:*
fært tú kanska 30% av lungnavirki aftur. Tú fert at orka meira og føla, at tú fært gjørt fleiri kropsvenj-




ingar.

*seks til nýggju mánaðum:*
útlitini til, at tú fært lungnasjúku, eru minni, tí kyknurnar, sum klæða lunguni, nú aftur verða so, sum tær skulu vera og gera sítt til, at lunguni hjá tær eru rein og heilsugóð.

*einum ári:*
vandin fyri, at tú fært hjartasjúku, er skorin niður í helvt. Tú hevur eisini skert vandan fyri striki, lungnasjúku og fleiri sløgum av krabbameini, teirra millum lungna-, hálsa- (lívmóðurhálsa-), bløðru- og nýrakrabba og krabba í brisi, barkakýli og vælindi.

*fimm árum:*
vandin fyri, at tú fært lungnakrabba er umleið helvtina av vandanum hjá honum, íð roykir ein pakka um dagin.

*tíggju árum:*
vandin fyri, at tú fært lungnakrabba, er næstan líka lítil sum hjá einum, ið ikki roykir. Frískar kyknur eru komnar ístaðin fyri tær kyknur, íð koma áðrenn krabbameinskyknurnar koma.

*(Tikið úr 'Tá ið síðsta sigarettin er roykt', Amerikanska tubbaksráðið 1995, 1996)*

Gevst tú at roykja, minkar tú eisini vandan fyri, at tey, sum eru uttan um teg og anda roykin frá tær niður í seg, verða sjúk.

Legg-av pakkar verða aftur seldir á apotekunum um landið 29. - 31. mai fyri 25 kr.

Hygg eftir seðilinum, sum verður í bløðunum vikuna áðrenn, klipp hann út og nýt hann til at keypa pakkan, sum inniheldur nikotin tyggigummi.